## Gomul skipsvrak leka olju



Tað hevur vakt ans í Svøríki, at gomul skipsvrak frá krígstíðini nú eru byrjað at leka olju út í Skagerak. Nógv vrak liggja við havsins botn frá krígstíðini, og eisini í Noregi eru tey farin at hugsa um, hvat kann fara at spyrjast burtur úr hesum. Í Noregi hugsa tey ikki minst um skipið »Skytten«, sum sakk út fyri Lysekil í 1943. Í løtuni lekur olja úr skipinum, sum liggur á 74 metra dýpi. Fakfólk siga, at tað fer at kosta millum 10 og 100 miljónir norskar krónur at tryggja vrakið. Bæði í Svøríki og Noregi stúra tey fyri, at fleiri skipsvrak fara at leka. Síðan 1914 eru tilsamans 263 skip yvir 100 BRT sokkin í Skagerak.

*(-vilmund)*

## Keypa ikki úr Eystursjónum

Eitt stórt fiskavirki í Bretlandi hevur nú gjørt av, at felagið ikki longur vil keypa tosk, sum er veiddur í Eystursjónum. Bretska felagið keypir tilsamans 17.000 tons av toski um árið til fiskafingrar, og hetta er ein fjórðingur av øllum toskinum, sum veiddur verður í Eystursjónum. Í norska fiskivinnublaðnum Fiskaren stendur einki um, hví avgerðin um ikki at keypa tosk úr Eystursjónum er tikin.

*(-vilmund)*

Føroyska fiskidagaskipanin:

# Besta skipan av sínu

**- Í prinsippinum skulu vit bara broyta fiskidagarnar, um veiðievnini hjá flotanum broytast. Føroyska skipanin lýkur øll krøv, sum sett verða til eina fiskiveiðiskipan. Eg veit ikki um nakað annað land, har undirtøkan í vinnuni fyri eini fiskiveiðiskipan er so stór sum í Føroyum. Nýtslurætturin skuldi eisini givið teimum, sum virka í vinnuni, eina ábyrgd, sigur Kjartan Hoydal**



*- Tað er ikki rætt, at ov nógvir dagar vóru inni í fiskidagaskipanini í byrjanini. Broyta vit skipanina ov nógv frá tí upprunaliga, verður neyðugt at stilla alla skipanina av nýggjum, heldur Kjartan Hoydal*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kjartan Hoydal var fyrstur á pallin á fiskivinnuráðstevnuni, sum varð hildin í Klaksvík á Føroya Sjómannadegi. Teir, ið stóðu aftanfyri hesa ráðstevnu – í ár eins og í fjør – eru Auðunn Konráðsson, Jákup Sólstein og Óli M. Lassen.

Kjartan er kendur innan føroyska fiskivinnuumsiting gjøgnum fleiri ár og á millumtjóða stigi sum skrivstovustjóri í NEAFC, sum er fiskiveiðifelagsskapurin í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum.

### Røttu karmarnir

- Evnið, sum eg havi fingið at tosa um, er fiskivinnupolitikkur og fiskidagaskipanin, men eg eri ikki politikari, segði hann skemtandi, áðrenn hann rættiliga legði fyri.

Í síni framløgu vísti Kjartan fyrst á tey krøv, sum eru til ein fiskivinnupolitikk.

- Vit hava fingið hetta havøki at røkja, sum er rímiliga stórt í mun til okkara fólkatal. Tað er ikki líkamikið, hvussu hetta verður umsitið. Úti í heimi er eisini stórur áhugi fyri, hvussu tilfeingið í havinum verður umsitið. Eisini umhvørvisfelagsskapir fylgja við, hvussu vit umsita okkara tilfeingi. Í hesum einskiljingartíðum verður nógv latið upp til marknaðin at avgera, og onkur meinar, at politisk stýring er av tí ónda. Men vit mugu hava onkrar karmar um veiðina. Hava vit ikki røttu karmarnar við hóskandi tali av skipum og soleiðis eisini hóskandi veiðitrýsti, fer alt út av lagi.

Hann segði, at tað fer altíð at verða orðaskifti um umsitingina av fiskiríkidøminum og vísti á, at nógv orðaskifti eisini hevur verið um gjald fyri at sleppa at veiða av tilfeinginum í havinum.

- Orð, sum vistskipanartilgongd, burðardyggleiki, fyrivarnisreglur og annað, seta krøv til myndugleikarnar. Trýstið kemur eisini frá umhvørvisfelagsskapum og teimum, sum keypa føroyskar fiskavørur, eisini í smásølu, segði Kjartan.

### Lýkur øll krøv

Hann reisti eisini spurningin, hvat tað er, sum vit vilja, tá vit vilja stýra fiskiskapinum.

- Jú, vit vilja helst fáa vinning av at veiða, vilja gjalda øllum eina rímiliga løn, eins og vinnan skal geva eitt íkast til samfelagið. Fiskivinnan er ein kapasitetsskapari, sum eisini kann verða við til at fjøltátta vinnulívið í samfelagnum annars.

Hann segði, at tá ið reglur verða settar fyri fiskiskapi, er týdningarmikið, at vinnan og onnur áhuga taka undir við teimum.

- Flestu lond áseta mest loyvdu veiði og fiska eftir eini kvotuskipan. Vit hava valt eina aðra skipan við fiskidøgum og stongdum leiðum. Í prinsippinum er eingin munur. Báðar skipaninar kunnu virka líka væl. Tað er veiðitrýstið, sum verður umsett til vekt í tonsum.

Kjartan segði, at í prinsippinum skulu vit bara broyta fiskidagarnar, um veiðievnini hjá flotanum broytast. Skal skipanin standast millum ymisku fiskasløgini, brúka vit stongdar leiðir.

- Mín fatan er, at føroyska skipanin lýkur øll krøv, sum sett verða til eina slíka fiskiveiðiskipan. Eg veit ikki um nakað annað land, har undirtøkan í vinnuni fyri galdandi skipan er so stór sum í Føroyum. Nýtslurætturin skuldi eisini tryggjað okkum, at vinnan verður rikin undir ábyrgd, legði hann aftrat.

### Óvissa í ráðgeving

Kjartan Hoydal segði seg vera av teirri áskoðan, at ráðgevingin til myndugleikarnar ikki fylgir andanum í okkara fiskiveiðiskipan – og ráðgevingin er eftir hansara tykki ikki nóg neyv.

- Avleiðingin av hesum er tær broytingar, sum politiskt eru gjørdar í fiskidagaskipanini, eitt nú við hesi ráðgeving fyri eyga. Onkrar broytingar eru skilagóðar, aðrar ikki.

Ein broyting, sum Kjartani ikki dámar, er, at loyvi hevur verið givið til at leggja veiðiloyvir saman tvørtur um skipabólkar.

- Hetta hevur verið við til at avlagað skipanina, heldur hann.

Hann sigur, at sjálvandi noyðist umsitingin at fylgja við, um veiðitrýstið broytist frá tí upprunaliga, tá skip verða skift út.